## Góð føroysk skrá

Við fýra dystum upp á tríggjar dagar, so var talan um harða skrá hjá luttakandi londunum í EM-undankappingini í flogbólti. Best mundi skráin tó hóva føroyingum. Bæði fríggja- og leygardag spældu okkara bert ein dyst, og tá var tað móti liði, sum hevði spælt dyst fyrr um dagin. Leygardagin spældu okkara tveir dystir, men tá var tað eisini móti liði, sum hevði verið í eldinum fyrr um dagin, og enntá høvdu okkara tá havt tveir tímar meira at hvíla seg í.



## Ov lág høll

Flogbóltssambandið hevur rópt varskóð, nú nýggj ítróttarhøll helst skal gerast í Havn. Við verandi karmum, so var nevnliga neyðugt við undantaksloyvi, um Føroyar skuldu standa sum vertir fyri altjóða flogbóltskapping. Tað er nevnliga so, at ein flogbóltshøll í minsta lagi skal vera níggju metrar høg, har hon er lægst. Á Hálsi í Havn varð lægsta hæddin sum máld sum 5,84 metrar, og tí hevur Flogbóltssambandið heitt á býráðið um at hava hetta í tonkunum, nú arbeitt verður við at gera nýggja høll.

# Liktenstein-dysturin kostaði



*Móti Liktenstein høvdu okkara fleiri ferðir avgerðina í egnum hondum, men hvørja ferð kiksaði, tá mest stóð á*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Føroysku kvinnurnar vóru nær við, men eftir kappingina kundu tær iðra seg um, at avgerandi stigini ikki vórðu fingin til høldar móti Liktenstein**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan gjørdist um greitt 3-0 tap í dystinum, sum skuldi tryggja okkara kvinnum víðari luttøkuna. Men talan varð í veruleikanum um eitt tap av heldur óneyðuga slagnum. Eitt tap, har føroysku kvinnurnar ikki stóðu mát, tá nervarnir og spenningurin trýstu ungu og óroyndu spælararnar.

Í øllum trimum settunum var tað nevnliga so, at okkara lógu væl fyri, tá komið varð fram til avgerandi bóltarnar. Í fyrsta settinum mistu okkara 20-17 til 20-24, og í næsta settinum mistu vit tveir settbóltar, áðrenn Liktenstein kundi serva settið heim. Og hóast nær við í seinasta settinum, so knekkaði filmurin eisini, tá avgerandi bóltarnir skuldu sláast í hesum.

### Royndirnar restaðu

Eftir dystin móti Luksmburg, sum altso varð tann seinasti hjá okkara kvinnum í kappingini, tosaðu vit við Helen á Lakjuni, og hon var ikki ósamd í, at dysturin móti Liktenstein gjørdist dýrur.

- Hann burdu vit havt vunnið. Heilt sikkurt.

*Men hvat gekk so galið?*

- Vit fokuseraðu kanska ov nógv upp á teirra spæl ístaðin fyri okkara egna. Tað var kanska størsta mistakið.

*Og sum spælari at vita, at tað nú verður eitt ár ella meira til næstu altjóða avbjóðingina, tá tað kundi verið meira. Er tað ikki eitt sindur hugstoytt?*

- Jú, tað er tað. Komu vit víðari, so vildi næsta kappingini kortini ikki verið fyrr enn næsta ár kortini, men tað er keðiligt, tí vit burdu komið víðari. Kanska er tað eisini tað, at fleiri av okkara spælarum fara niður við høvdinum, tí royndirnar ikki eru tær nógvu. So tað er avgjørt eisini ein partur av frágreiðingini, segði Helen á Lakjuni eftir dystin.



*Helen á Lakjuni sæst her saman við Birgit Guttesen, Sólgerð Henriksen og Anniku á Stongum, tá føroyska exit'ið var veruleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Liktinstein tók annað-plássið

**Eitt betri lutfall millum vunnin og tapt sett var avgerandi, tá Liktinstein togaði seg framum Skotland á stigatalvuni**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Skotsku kvinnurnar gjørdust akkurát ov stuttar í royndunum at røkka næsta umfarinum í EM-undankappingini.

Kappingin í Føroyum var at kalla ein undanundankapping, og tey bæði bestu liðini vunnu sær rætt til næsta umfarið í kappingini. Talan kundi tó møguliga verða um trý lið, tí Liktinstein er nevnliga vertur fyri næsta umfarinum, og tí vóru tær undir øllum umstøðum við í næsta umfarinum.

Tá stigatalvan eftir kappingina í Føroyum varð gjørd upp, stóð á jøvnum í stigum millum Liktinstein, Skotland og Føroyar. Liktinstein og Skotland høvdu bæði sama settmun, men avgerandi var, at Liktinstein hevði betri lutfall millum vunnin og tapt sett.

### FAKTA um dystirnar

| | | |
|---|---|---|
| Skotland-Luksemburg | 2-3 | (21-25, 25-19, 25-16, 22-25, 8-15) |
| Írland-Liktenstein | 0-3 | (15-25, 17-25, 23-25) |
| Føroyar-Skotland | 3-1 | (21-25, 25-19, 25-20, 25-15) |
| Írland-Føroyar | 1-3 | (21-25, 12-25, 30-28, 11-25) |
| Liktensetin-Luksemburg | 0-3 | (24-26, 23-25, 22-25) |
| Skotland-Írland | 3-1 | (25-18, 25-22, 23-25, 25-13) |
| Føroyar-Liktenstein | 0-3 | (22-25, 25-27, 22-25) |
| Luksemburg-Írland | 3-1 | (25-12, 25-20, 23-25, 25-18) |
| Liktensetin-Skotland | 1-3 | (25-19, 17-25, 21-25, 16-25) |
| Luksemburg-Føroyar | 3-0 | (25-19, 25-12, 25-21) |